StÍF-Stjørnan 23-23 (11-10)

# StÍF avgjørdi ferðina

**Javnleikur á Skála var kanska ikki tað, tey flestu høvdu roknað við, men StÍF dugdi at draga ferðina niður, so Stjørnan ikki slapp at spæla sítt spæl**



*Stjørnan fekk eftir stórsigurin í fyrsta umfari bara javnleik á Skála*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

KVINNUHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Í allarsíðstu løtuni í dystinum á Skála sunnudagin hevði Stjørnan møguleikan at fáa avgerandi málið, men tað miseydnaðist. At so drál var orsøkin til júst ta støðuna, var kanska eitt sindur øvugt, tí undanfarnu 59 minuttirnar hevði tað verið StÍF, ið hevði ligið meira á tí bógvinum.

Tá ein javnur dystur nærkast endanum, ræður um ikki at gera nakað býtt í teimum allarsíðstu álopunum, tí tað kann brádliga geva mótstøðuliðnum møguleikan at fara í hin endan og avgera alt.

Klokkan var farin í holt við síðsta minuttin, tá dómararnir góvu til kennar, at nú fóru teir at døma fyri drál hvørja løtu. Stjørnan fekk tríggjarmeturkast, men valdi at fáa »time-out«, áðrenn tað varð tikið.

Tá spælið varð tikið uppaftur, skuldi bólturin bara spælast eina ferð og síðani skuldi skjótast, annars dømdu dómararnir drál. Hetta høvdu tær í Stjørnuni helst ikki fingið við, tí tær royndu seg við meiri enn tí einu sendingini, áðrenn nakað skot kundi koma, og so mistu tær álopið.

Til alla lukku fyri klaksvíkskvinnurnar, eydnaðist ikki StÍF at fáa mál burtur úr síðstu sekundunum, og tí stóð altso á jøvnum 23-23, tá dysturin endaði.

### Hekk ikki saman

Hetta var óivað nakað, ið hóskaði StÍF væl betur enn Stjørnuni, tí allan dystin hevði StÍF megnað at hildið ferðina á spælinum so mikið niðri, at Stjørnan ongantíð ordiliga kom í snúningar og fekk yvirrunnið StÍF-liðið.

Ferð eftir ferð vóru kvinnurnar hjá StÍF á markinum til at fáa drál dømt ímóti sær, men megnaðu so at avslutta og gjarna fáa mál burturúr. Og soleiðis gekk tað fyri ein stóran av tíðini.

Kanska darvaði tað eisini Stjørnuni eitt sindur, at teir nýggju útlendingarnir á liðnum ikki altíð riggaðu so væl í samanspælinum, sum væntast kann, tá nakrir fleiri venjingartímir og dystir eru farnir aftur um bak.

Tær vóru ikki komnar, tá fyrsti dysturin var fyri viku síðani, men hesa ferð sluppu so allar tríggjar at royna seg. Lidija Vlajic stóð væl í málinum, men ikki var tað altíð, at Katarina Stjepanov og Jelena Barlov fullu inn í samanspælið annars á liðnum.

At Annika Ljósstein ta einu løtuna í seinna hálvleiki fór út eitt skifti, bøtti heldur ikki um, hóast hon fekk lyft spælið nakað, tá hon so kom innaftur.

### Sera einfalt

Sum sagt, var uppskriftin hjá StÍF-kvinnunum sera einføld, og tær megnaðu eisini at fylgja henni í so stóran mun, at Stjørnan ongantíð slapp avstað, sum annars kundi verið væntandi, at klaksvíkskvinnurnar ætlaðu sær.

Í álopsstøðunum spældi StÍF bóltin runt og fór so inn at bjóða av við skotroyndum, tá løtan kom. Serliga vóru tað Alina Olaru og Milica Ergic, sum er komin til StÍF frá Tjaldri, ið stóðu fyri gjøgnumbrotunum og tóku tey tyngru tøkini á liðnum.

Breiddin hjá StÍF er ikki tann sama sum hjá Stjørnuni, men sunnudagin sá tað ið hvussu er ikki út til at nerva tað allarminsta.

### Dysturin í tølum

**StÍF-Stjørnan 23-23 (11-10)**
Málskjúttar
StÍF: Alina Olaru 11 (2), Milica Ergic 7 (1), Poula Olsen 3, Paula Høgnesen 1, Guðrun Ólavsdóttir 1
Stjørnan: Joan Midjord Djordjevic 6 (2), Annika Ljósstein 5 (2), Anna Kristina Samson 4, Bára S. Klakkstein 3, Katarina Stjepanov 3 (2), Jelena Barlov
Brotskøst: StÍF 3, Stjørnan 7
Ávaringar: StÍF 2, Stjørnan 3
Útvísingar: StÍF 2, Stjørnan 1
Dómarar: Kári Hansen og Trygvi Mortensen

Neistin-Kyndil 33-12 (14-6):

# Einki at rafla um

**Kvinnurnar hjá Neistanum vundu í grannauppgerðini leygardagin burtur úr Kyndli, ið hevði sera lítið at vísa**

KVINNUHOND-BÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

At Neistin er á veg við einum spennandi liði, fekst longu ábending um í fyrsta landskappingarumfarinum, hóast Neistin tá tapti á heimavølli við sjey málum móti greipuvinnarunum úr VB.

Ikki minst, eftir at VB á heimavølli setti silvurvinnararnar úr VÍF upp á pláss sunnudagin, varð stórsigurin hjá Neistanum leygardagin á Kyndli settur í relieff.

Talan gjørdist um sanna eyðmýking, tá Neistin í grannauppgerðini vann 33-12, eftir at hava havt sannførandi hálvleiksleiðsluna 14-6. Og so gav seinni hálvleikur enntá meira av sama slagi, so hann varð vunnin heili 19-6…

Í øllum lutum var munurin stórur á liðunum, og hóast málverjin hjá Kyndli, Fríða Petersen, í meðal annanhvønn minutt mátti síggja bóltin fara inn um seg, so syrgdi hon við fleiri bjargingum fyri, at ósigurin ikki gjørdist enn størri.

Neistin hevði hinvegin breidd og dygd í sínum spæli og talan var í stóran mun um skjótan hondbólt. Í verjuni stóðu tær væl, og so varð mangan gjørt sera skjótt av í skjótálopum, ið góvu tey nógvu av málunum.

Serliga var tað Ása Dam á Neystabø, ið gjørdi um seg. Javnan fangaði hon bóltin, tá Kyndil var í álopi, og so brúkti hon skjótleikan til at renna frá mótstøðuliðnum og skora.

Sum sagt, so verður óivað spennandi at síggja, hvussu liðið hjá Neistanum fer at mennast gjøgnum kappingina. Nógvar av teimum yngru eru vanar við at vinna, og kanska kann tað geva Neistanum eitt skump rætta vegin eftir nøkur rakár.

Hinvegin er alneyðugt hjá Kyndli at fáa vend í. Og tað kann sigast longu nú, hóast hetta bara var annar dysturin á árinum, tí mistøk og veikleikar hava havt ov stóran leiklut í teimum báðum dystunum, sum eru taptir - fyrst móti Stjørnuni og nú uppaftur meira móti Neistanum.

### Dysturin í tølum

**Neistin-Kyndil 33-12 (14-6)**
Málskjúttar
Neistin: Ása Dam á Neystabø 12 (3), Simone Dziugyte 6 (1), Lív Sørensen 4 (2), Lina Andriulyte 2, Rakul Augustinussen 2, Unn J. Kragesteen 2, Jórun Ludvig 2, Marjun Tróndarson 2, Vivian Unadóttir 1
Kyndil: Sólja Jóanisdóttir 4, Ann Mari Wang 3, Anja Heinadóttir 2, Sabine Frølund 1 (1), Ingrid Petersen 1, Randi Wardum 1
Brotskøst: Neistin 7, Kyndil 1
Ávaringar: Neistin 3, Kyndil 2
Útvísingar: Kyndil 6
Dómarar: Hannis Wardum og Uni Wardum



VB-VÍF 25-14 (15-8)

# VB vant burtur úr VÍF

**VB-kvinnur plaga at vera sterkar á heimavølli, og sunnudagin staðfestu tær, at so er sanniliga eisini í ár. Tær vunnu ein óvæntað stóran sigur á VÍF, ið ongantíð fekk fótin fyri seg í dystinum**



*VB-kvinnurnar vunnu ein óvæntað stóran sigur á VÍF*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

KVINNUHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Tey, ið høvdu væntað, at ársins fyrsti toppdystur skuldi koma undan kavi vesturi á Vágseiði sunnudagin, fingu eitt satt vónbrot. Tað var bara annað liðið, ið livdi upp til toppheitið, meðan hitt fekk av at vita.

VB-kvinnurnar, sum jú vunnu sær greipuna í fjør, hava veruliga hildið fast í rætta endanum, nú hondbóltskappingin hjá kvinnunum aftur er farin í gongd.

Tær løgdu fyri við tryggum útisigri á Neistanum, ið tykist hava eitt gott lið í ár, og sunnudagin hildu tær fram við stórum heimasigri á VÍF, ið var størsta og einasta hóttanin móti VB undanfarna kappingarár.

Líkt er til, at VB hevur tað sama í kvittanum í ár, sum gjørdist endin hjá teimum í fjør, tá tað annars við kappingarbyrjan var upp á tal als ikki at hava lið í 1. deild. Bæði vágbingar og øll onnur gjørdust tó klókari…

### Sum í fjør?

Nú skulu vit sjálvandi ikki avgera kappingina, eftir at bert tvey umfør eru spæld, tí í fjør hendi í grundini tað sama í einum av dystunum millum VB og VÍF í Vági. Ta ferðina vann VB eisini sannførandi, men fekk so sanniliga eisini sína sak fyri í Vestmanna, har VÍF vann greitt.

Tó eru tekin um, at VB ikki hevur eitt veikari lið í ár enn í fjør - heldur tvørturímóti. Fleiri av stuðulsspælarunum, ið ikki vóru við í fjør, eru komnir afturíaftur, og haraftrat er litaviska íkastið hesa ferð ikki minni gott!

VÍF í sínum lagi hevur so sjálvandi fingið Ioanu Rapa aftur, men dysturin sunnudagin var ikki ein av teimum, har hon fekk bjargað liðnum. Sóley Mikkelsen, ið ikki var við fyri viku síðani, var við í Vági, og hon gjørdist eisini toppskjútti hjá VÍF, men uttan at tað heldur fekk bjargað liðnum.

### Verju- og kontraspæl

VB fekk eina góða byrjan í dystinum, har serliga annar av nýggju spælarunum, Aukse Vysmianskaite, fekk gjørt nógv um seg - saman við Daivu Toumaite, ið als ikki sær út til at hava gloymt, hvussu málini skulu skjótast.

Tær báðar syrgdu við sínum álopsspæli fyrstu minuttirnar fyri, at VB kom á 6-0, áðrenn tað eydnaðist VÍF at koma upp á máltalvuna. Og tá verjuparturin hjá VB samstundis riggaði sera væl, gjørdist tað nokk so skjótt andróður hjá vestmannakvinnum.

Tað var nevniliga við sterkari verju og skjótum kontraspæli, at VB setti seg á dystin frá byrjan. Tá fyrstu tveir triðingarnir av fyrra hálvleiki vóru farnir aftur um bak, hevði VB longu lagt tíggju mál millum seg og VÍF.

Móti endanum á fyrra hálvleiki gjørdu vestmannakvinnur ein lítlan vørr, men tað tók VB læddliga innaftur fyrst í seinna hálvleiki, tá dysturin í grundini var liðugur og avgjørdur eftir fyrstu tíggju minuttunum.

Í verjupartinum eydnaðist væl hjá VB at halda bakkunum hjá VÍF frá at sleppa framat. Ta fyrstu løtuna við einari 5-1 uppstilling, sum næstan beinanvegin varð skift út við 6-0, ið vísti seg at vera nóg tøtt til at taka broddin av álopsspælinum hjá VÍF.

### Ikki úr stað

So hvørt sum tað leið út á seinna hálvleik, gjørdist dysturin minni áhugaverdur, tí alt var í grundini longu avgjørt.

Eingi tekin vóru til, at VÍF kundi venda nøkrum, hóast tað í løtum í seinna hálvleiki var meira veiggj í VÍF, enn tað hevði verið fyrstu trý korterini.

Tá Daiva Toumaite mitt í seinna hálvleiki mátti út við skaða, valdi VÍF at pilka Aukse Vysmianskaite burturúr við mansverju, men tað gav ikki nóg mikið til at fáa vent spælinum og dystinum.

Hvørja ferð VÍF fekk eitt mál, svaraði VB aftur við einum, og tí kom VÍF ikki úr stað. Av tí sama gjørdist dysturin so líðandi bara ein avgreiðsluspurningur hjá heimaliðnum.

Uttan iva hevur dysturin givið VÍF bæði eitt og annað at hugsa um. Men kanska var hetta nú ikki annað enn tað sama, sum hendi í fjør? Tað mugu komandi dystir vísa, men í hesi fyrstu uppgerðini millum gull og silvur undanfarna kappingarár læt VB ongan iva vera um, hvat av liðunum var tað betra.

### Dysturin í tølum

**VB-VÍF 25-14 (15-8)**
Málskjúttar
VB: Aukse Vysmianskaite 8 (1), Daiva Toumaite 7 (1), Gurið Mortensen 5, Rannvá Augustinussen 2, Laila Jespersen 2, Margreth Augustinussen 1
VÍF: Sóley Mikkelsen 5 (2), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Finngerð Jensen 2, Fríða Marjunardóttir 2, Ioana Rapa 2, Alis Høghamar 1
Brotskøst: VB 3, VÍF 3
Ávaringar: VB 2, VÍF 2
Útvísingar: VB 1, VÍF 1
Dómarar: Birgir Dimon og Kári Niclasen

## Hondbóltsstøður

**1. deild, kvinnur:**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. | VB | 2 | 2-0-0 | 53-35 | 4 |
| 2. | Stjørnan | 2 | 1-1-0 | 48-34 | 3 |
| 3. | Neistin | 2 | 1-0-1 | 54-40 | 2 |
| 4. | VÍF | 2 | 1-0-1 | 35-38 | 2 |
| 5. | StÍF | 1 | 0-1-0 | 23-23 | 1 |
| 6. | Sóljan | 1 | 0-0-1 | 13-21 | 0 |
| 7. | Kyndil | 2 | 0-0-2 | 23-58 | 0 |

**1. deild, menn:**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. | VÍF | 1 | 1-0-0 | 32-24 | 2 |
| 2. | Kyndil | 1 | 0-1-0 | 32-32 | 1 |
| 3. | Neistin | 1 | 0-1-0 | 32-32 | 1 |
| 4. | KÍF | 0 | 0-0-0 | 0- 0 | 0 |
| 5. | StÍF | 0 | 0-0-0 | 0- 0 | 0 |
| 6. | H71 | 1 | 0-0-1 | 24-32 | 0 |